gult cyan magenta svart

Føroyingar ikki við á hvalaveiðifundi

Í hesum døgum hevur altjóða hvalaveiðinevndin IWC sín 52. ársfund í Adelaide í Australia. Føroyar hava í nógv ár verið umboðaðar á hesum ársfundum, men í ár hava føroyingar valt at halda seg burtur

RÚNAR REISTRUP

Altjóða hvalaveiðinevndin, ið hevur til endamáls at røkja stórhvalastovnarnar og soleiðis leggja lunnar undir eini hóvligari menning av hvalaveiðiídnaðinum, hevur ársfund í australska býnum Adelaide í hesum døgum. Men hóast Føroyar mugu metast at vera áhugaverdar í hvalaveiðihøpi, so hevur Landsstýrið í ár valt ikki at senda nakað umboð á ársfundin.

Orsøkin er sambært Kate Sanderson úr uttanlandsdeildini hjá Landsstýrinum tann, at IWC hevur mist sítt trúvirði sum felagsskapur fyri skynsamari hvalaveiðu. Meir enn helvtin av limalondunum í IWC hava ongantíð veitt hval, og sambært Kate Sanderson lata nógv av hesum londum seg stýra av áhugafelagsskapum ímóti hvalaveiðu í ein slíkan mun, at tey ikki taka vísindaligu tilráðingarnar til eftirtektar.

Av tí sama hevur IWC enn ikki slept einum einasta hvalaveiðibanni, hóast vísindaligu tilráðingarnar siga, at ikki allir stórhvalastovnar eru hóttir, og at tað tískil átti at verið grundarlag fyri einari avmarkaðari veiðimongd av ávísum hvalasløgum.

Sambært Kate Sanderson úr uttanlandsdeildini hjá Landsstýrinum, hevur altjóða hvalaveiðinevndin IWC mist sítt trúvirði sum felagsskapur fyri skynsamari hvalaveiðu

Eigur ikki at blanda seg í grindadráp

Millum annað hetta hevur virkað til, at føroyingar fyribils eru givnir at senda fólk á ársfundirnar hjá altjóða hvalaveiðinevndini.

Oftast kemur onkur fyrispurningur um grindadráp fram á ársfundunum hjá IWC, men har hevur greiða svarið frá føroyskari síðu hvørja ferð verið, at slíkir fyrispurningar gjarna verða svaraðir, men ikki hoyra heima í IWC samanhangi. Út frá hesi sannføring, hevur síðan verið heitt á landið, ið hevur reist fyrispurningin, um at senda fyrispurningin beinleiðis til Føroya.

Sambært føroysku myndugleikunum hoyra grind og grindadráp í veruleikanum ikki til málsøkini hjá altjóða havalveiðinevndini.

– Vit halda ikki at IWC eigur at umsita smáhvalastovnar, og hetta hava vit eisini fingið donsku sendinevndina at taka undir við, greiðir Kate Sanderson frá. Hóast einki føroyskt umboð nú er á ársfundinum, fer danska sendinevndin framhaldandi at svara møguligum fyrispurningum um grindadráp á sama hátt sum higartil hevur verið svarað.

Onki alment mótmæli

Hóast eingi umboð fyri Føroyar við á fundinum í ár, so er landið umboðað av donsku sendinevndini undir øllum umstøðum. Tá føroyingar hava verið við á fundunum hjá altjóða hvalaveiðinevndini hevur tað somuleiðis verið sum partur av donsku sendinevndini. Við teirri ríkisrættarligu støðu, sum Føroyar hava í dag, ber ikki til at vera sjálvstøðugur limur í IWC, og talan er sostatt ikki um at føroyingar alment mótmæla felagsskapinum við ikki at møta upp til ársfundin, men heldur at fundurin stutt og greitt verður burturprioriteraður frá føroyskari síðu.

– Vit eru limir í norðurlendska hvalaveiðifelagsskapinum NAMMCO og tað halda vit vera ein meira hóskandi felagsskap at umsita smáhvalaveiðuna kring Føroyar, sigur Kate Sanderson, og leggur afturat, at tað tí er umráðandi, at føroyingar brúka sítt avmarkaða tilfeingi til at styrkja NAMMCO.

Hon dylir tó ikki fyri, at tað kann tulkast sum ónøgd við altóða hvalaveiðinevndina, at Føroyar ikki fara til ársfundin hjá IWC, men ivast í, um hetta verður lagt til merkis av hinum londunum á ráðstevnuni, við tað at Føroyar sum nevnt ikki er sjálvstøðugur limur í felagsskapinum.

Ætla ikki at bróta bannið

Í løtuni er stórhvalaveiða ikki so aktuell í Føroyum. Men grannaland okkara Noreg drepur árliga nakrar millum fimm- og sekshundrað størri hvalir. Sambært hvalaveiðibanninum, ið IWC umsitur, er tað møguligt hjá einum landi at seta seg ímóti banninum og harvið er ber til hjá viðkomandi landi at halda fram við at veiða hval.

Norðmenn settu seg ímóti banninum hjá IWC, ið varð sett í gildi í 1987, men gavst kortini við hvalaveiðu síni. Í 1993 fóru norðmenn so undir aftur at veiða hval í avmarkaðum nøgdum, hóast mótmæli frá millum øðrum IWC.

At føroyingar aftur fara at veiða hval undir verandi hvalaveiðibanni er lítið hugsandi, tí Danmark setti seg ikki ímóti hvalaveiðubanninum, tá tað varð samtykt, og tískil ber ikki til hjá føroyingum at skáka sær undan.
Men um IWC broytir støðu og aftur fer at loyva veiðu eftir ávísum hvalasløgum, so er tað hugsandi at størri hvalir fara at verða drignir upp á land í Føroyum.

Fylgja við kortini

Sum er røkist tó einki fyri at limalondini í altjóða hvalaveiðinevndini fara at semjast um at loyva gagnnýtslu av teimum hvalastovnum, ið metast at vera væl fyri.

Men hendir nakað á økinum, er tað áhugavert hjá føroyingum, og tí vendir Landsstýrið ikki blinda eygað ímóti IWC hóast alt.
– At vit ikki eru til staðar á ársfundinum merkir ikki, at vit ikki fylgja við og eru áhugað í tí, sum kemur fram á fundinum, sigur Kate Sanderson og greiðir frá, at føroysku myndugleikarnir hava gott samstarv við sendinevndirnar hjá hinum norðurlondunum og harvið fáa fylgt væl við í tí, sum fer fram.

At danir í síni tíð gjørdust limir í IWC komst í stóran mun av føroysku stórhvalaveiðuni, sum helt fram í langa tíð, eftir at danir góvust at veiða hval.

Og føroyingar hava eisini verið partur av donsku sendinevndini so gott sum hvørt ár fram til í fjør, tá vit heldur ikki vórðu umboðað á ársfundinum hjá altjóða hvalaveiðinevndini.

Fiskirannsóknarstovan skal vera við

Jørgin Niclasen, landsstýrismaður, vil ikki hoyra talan um, at Fiskirannsóknarstovan skal burtur úr arbeiðinum í Skipanarnevndini. – Tað stendur í lógini at teir skulu vera við, og tað verða teir, sigur hann og leggur afturat, at eru fiskifrøðingarnir ikki samdir, so eiga teir at arbeiða fyri sínum sjónarmiðum

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri nøkrum døgum síðani kom fram, at Fiskirannsóknarstovan vil sleppa burturúr arbeiðinum í Skipanarnevndini. Fiskifrøðingarnir eru ikki so fegnir um, at teir skulu gera tilmæli til nevndina, sum teir sjálvir ikki kunnu taka undir við, og teir meta, at tað tekur ein part av trúðvirðinum frá teimum.

At Fiskirannsóknarstovan meinar tað tey siga í álvara, var almannakunngjørt í dag, tá Skipanarnevndin legði fram frágreiðing sína fyri fiskimálaráðharran at taka støðu til. Í fylgiskrivinum til frágreiðingina skrivar Kjartan Hoydal, formaður, at nevndin er samd um frágreiðingina, men at Fiskirannsóknarstovan hevur sent Fiskimálastýrinum bræv um sítt arbeiðið í nevndini og umboðið fyri Fiskirannsóknarstovuna í nevndini hevur tí ikki góðkent endaligu frágreiðingina, men vísir til tilmælið frá stovninum.

Tað er synd at siga, at Jørgin Niclasen, landsstýrismaður, er nøgdur við avgerðina hjá Fiskirannsóknarstovuni, og hann hevur heldur ikki í hyggju at lata stovnin sleppa burtur úr arbeiðinum í nevndini.

– Eg haldi, at tað er ótrúliga óheppið. Higartil hava vit havt ta styrki, tá vit hava verið uttanfyri landoddarnar, at hjá okkum arbeiða vinna og fiskifrøðingar saman um at fáa skilabestu loysnina, sigur Jørgin Niclasen.

Hetta heldur hann at vit eiga at halda fram við at gera, og tí hevur hann ikki í hyggju at lata Fiskirannsóknarstovuna sleppa undan at arbeiða í Skipanarnevndini.

– Eitt annað er so tað, at tað er lógarkrav, at stovnurin skal vera við í arbeiðinum, leggur Jørgin afturat. Spurdur um hann skilir sjónarmiðini hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum skal hava eftirlit við, at fiskastovnarnir eru í forsvarligum standi, sigur Jørgin Niclasen, at tað ger hann lutvíst. – Men eg haldi, at teir framhaldandi áttu at verið við, tí tað er har, teir kunnu gera sína støðu galdandi. Tað er ikki serliga diplomatisk loysn, bara at kasta frá sær og taka seg burturúr, sigur hann.

Men er hetta kanska ikki eitt tekin um, at fiskifrøðingarnir eru troyttir av, at tað ikki verður lurtað eftir tí teir siga?

– Tað er ikki óhugsandi. Men framvegis haldi eg, at tað er at fara ov langt, at leggja kongin og rýma úr einum samstarvi, sum er til gagns fyri vinnuna og fyri stovnarnar.

Í sínum tilmæli sigur Fiskirannsóknarstovan, at eftir teirra meting eigur veiðitrýstið at verða lækkað rættiliga nógv. Kortini mælir Skipanarnevndin til at halda fast við dagatali. So er ikki so torført, at skilja at fiskifrøðingarnir halda tað vera týdningarleyst at vera við.



Jørgin Niclasen, landsstýrismaður, er als ikki nøgdur við avgerðina hjá Fiskirannsóknarstovuni um at sleppa burturúr arbeiðinum í Skipanarnevndini

– Var tað grundgevingin í brævinum, so hevði eg skilt tað, men tað er ikki tað, sum verður sagt í brævinum, sigur Jørgin Niclasen.

Tó er tað ikki óhugsandi, at hóttanin frá Fiskirannsóknarstovuni fer at hava sítt at siga, tá landsstýrismaðurin fer at gera sítt tilmæli til politisku viðgerðina av fiskidagatalinum fyri komandi árið.

Á tíðindafundinum vísti Jørgin Niclasen til óskrivaðu semjuna millum samgonguflokkarnar, og segði, at hann nokk fór at mæla til, at fiskidagatalið verður skorið eitt sindur í mun til tað, sum tað er nú. Um tað so fer at bera til at fáa undirtøku í tinginum fyri niðurskurði í dagatalinum, visti Jørgin ikki, men hann metti, at samgonguflokkarnir fara at taka undir við tí.

gult cyan magenta svart

Nú skal samrá›ast li›ugt

Stendur ta› til løgmann, skulu allir spurningar uttan skiftistí›in avgrei›ast endaliga á næsta samrá›ingarfundi um ríkisrættarligu stø›una

JOHN JOHANNESSEN

Á næsta samrá›ingarfundinum vi› donsku stjórnia vil løgma›ur hava endaliga grei›u á felags rættindunum, gjaldoyrasamstarvinum, umsitingarliga samstarvinum og kongsfelagsskapinum vi› Danmark.

Hetta ger løgma›ur greitt í einum brævi til danska forsætisrá›harran t‡sdagin.

Løgma›ur heldur, at partarnir á fundinum eiga at koma til eina endliga politiska loysn á øllum hesum økjum, so til ber at gera eina felags ni›urstø›u.

Fyri at hetta skal bera til, sk‡tur løgma›ur upp, at embætisfólkini hjá bá›um pørtum fáa grei›u á øllum tekniskum vi›urskiftum í hesum spurningum, solei›is, at stjórnin og landsst‡ri› ikki n‡tast brúka tí› til hetta á næsta samrá›ingarfundinum.

Hvassor›a›ur løgma›ur

Løgma›ur er í restini av brævinum óvanliga hvassor›a›ur. Hann sigur seg vera ógvuliga ónøgdan vi› seinasta samrá›ingarfundin, eins og tann fyrsta, i› var› hildin 17. mars.

– Seinasti fundurin í Keypmannahavn avmynda›i, eftir uppfatan landsst‡risins, serlistaklia ósamskapa›u vi›urskiftini millum landsst‡ri› og donsku stjórnina í samrá›ingunum um føroyskt sjálvræ›i, skrivar løgma›ur.

Anfinn Kallsberg leggur afturat, at samrá›ingarnar samanumtiki› hava veri› ófullnøktandi fyri landsst‡ri›, ikki minst í einum máli›, sum hevur so stóran t‡dning fyri føroyska fólki›.

Løgma›ur harmast eisini um, at stórnin á seinasta samrá›ingarfundinum var ímóti at seta eina felags nevnd at finna eitt faktuelt grundarlag fyri búskaparligu skiftistí›ini. Hann heldur nevniliga, at júst ein slík nevnd hev›i fingi› grei›u á ósemjuni um skiftistí›ina, eins og hon kundi fingi› í lag postivt samskifti millum partarnar um hendan spurning.

Loysa trupulleikan vi› skiftistí›ini

Løgma›ur kunnar í brævinum danska forsætisrá›harran um, at landsst‡ri› í løtuni kannar, um ta› finnast altjó›a mannagongdir fyri at loysa slíkar trætur, sum trætuna millum landsst‡ri› og stjórnina um skiftistí›ina.

Annars ætlar landsst‡ri› at finna út av, hvussu partarnir á ein konstruktivan hátt kunnu finna eina semju á hesum øki. Talan skal vera um eina semju, i› samsvarar vi› avtaluna frá 10. juni 1998. Í hesi avtalu bindir danska stjórnin seg til at virka fyri, at minka blokkstu›ulin á ein slíkan hátt, at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap.

Landsst‡ri› mi›ar eftir, at næsti samrá›ingarfundurin skal vera í Føroyum so skjótt, sum møguligt eftir summarfrítí›ina.

Stendur ta› til løgmann, koma Pul Nyrup Rasmussen og Anfinn Kallsberg at sita í Føroyum næstu fer› teir halda tí›indafund eftir loknan samrá›ingarfund

Peningastovnarnir í góðum standi

Gjaldføri í føroysku peningastovnunum er gott. Góðar tríggjar milliardir eru tøkar hjá peningsstovnunum og tað skuldi havt við sær, at teir standa á tryggari grund

SVEINUR TRÓNDARSON

Føroysku peningastovnarnir hava árini eftir kreppuna havt vind í seglunum. Hvøkkurin eftir skrædlið fyrst í 90-unum hevur bitið seg fastan í hugan hjá teimum, sum ráða og sum tað sær út í løtuni, vilja teir ikki lata sær lynd, at vera tiknir á bóli enn einaferð.

Hyggja vit eftir hvussu javnin hjá peningastovnunum sær út, so síggja vit, at innlánini eru økt rættiliga fitt, útlánini ikki so nógv, meðan gjaldføri seinasta árið hevur hildið sær á umleið trimum milliardum.

Hesi tøl merkja at føroysku peningastovnarnir standa á rættiliga tryggari grund. Útlánini vaksa ikki við somu ferð, sum innlánini og tann peningur, sum tá verður til avlops, verður settur í annað enn lán. Her kann talan verða um lánsbrøv ella í partabrøv uttanlands, sum tó er meira sjáldsamt.

Eitt annað, sum vit kunnu festa okkum við er, at ábyrgdirnar eru komnar niður á góðar 200 milliónir. Fyri um tíggju árum síðani vóru ábyrgdirnar omanfyri tvær milliardir, og tað vil siga, at ein stórur partur av "møguligu skyldunum" hjá peningastovnunum eru burtur

Landsbankin: Kunning um Føroyar

Landsbankin hevur sent út frágreiðing á enskum máli um Føroyar og føroysk viðurskifti. "Information Memorandum 2000" er tøkt á internetinum og kann takast niður haðani

SVEINUR TRÓNDARSON

Ritið um Føroyar og føroysk viðurskiftið verður givið út vegna Føroya Landsstýri stendur í innganginum.

Hefti, sum er góðar 20 síður til støddar, viðgerð Føroyar í sínari heild. Frá landafrøðisligu viðurskiftunum til tann fíggjarliga politikkin og búskap.

Sum skilst er "Information Memorandum 2000" ikki ætlað, sum ein úttømandi kelda um føroysk viðurskiftið, men meira sum ein stutt gjøgnumgongd av teimum viðurskiftum, sum eru galdandi í landinum.

Greitt verður frá politisku skipanini við útgangsstøði í landsstýrinum, sum situr við ræði. Felagsskapurin við Danmark er umrøddur, og greitt verður frá skipanini við sermálum og felagsmálum.

Sum vera man, er tað tann búskaparligi parturin, sum hevur ta størstu og drúgvastu umtaluna. Greitt verður frá, hvussu føroyski búskapurin hongur saman, og greitt verður eisini at tætta samanhanginum millum fiskin og føroyska búskapin.

Tað undrar neyvan heldur, at uttanlandsskuldin hevur sítt egna kapittul. Skuldin, sum hevur verið so ómetaliga stór, er nú komin niður á góðar 4 milliardir og frágreiðingin um, hvussu tað ber til stendur eisini í kunningarritinum. Ritið er at finna á adressuni: http://landsbank.fo

Bygdastevnan á Strondum

07. - 08. - 09. juli

Fríggjadagin 07. juli
kl. 19.00 Sjavskapping

Leygardagin 08. juli
kl. 15.00 Tivoli opnar
kl. 15.00 Cafeteria opnar
kl. 15.00 Karusell, hoppiborg, klatriveggur, hamarslag, akibreyt og bóltkast
kl. 16.00 Rulluskoytukapping (trygdarútgerð krevst)
kl. 17.00 Kappsigling (luttakararnir møta í Heygsstøð kl. 16.00)
kl. 19.00 Barnadiskotek
kl. 20.00 Vísusangur við Hanus G. Johansen
kl. 21.00 Útimøti við luttøku úr Kelduni
kl. 22.00 Felagssangur í Stráluhølinum
kl. 23.30-04.00 Dansur - Moonshot spælir

Sunnudagin 09. juli
kl. 11.00 Gudstænasta í Sjóvar kirkju v/ Jógvan Fríðriksson
kl. 15.00 Tivoli á kappróðra økinum
kl. 15.00 Kappróður
kl. 18.00 Tivoli opnar við Bygdarhúsið
kl. 18.00 Cafeteria opnar
kl. 18.00 Karusell, hoppiborg, klatriveggur, hamarslag og akibreyt
kl. 18.00 Stórt vørutombola
kl. 18.30 Stórt eydnuhjól (at vinna verður m.a. 10 lomb í heyst)
kl. 21.30 Útimøti við luttøku úr missiónshúsinum

Sosialurin - 311820